Vikuskiftis Sosialurin



## Bann ímóti oljuvinnu

Heimsnáttúrugrunnurin WWF hevur fleiri ferðir sagt seg vera ímóti, at oljufeløg sleppa at leita eftir og at taka upp olju og gass í tí arktiska økinum, og nú er grunnurin komin við einum beinleiðis tilmæli um bann. Tað upplýsti Neil Hamilton, sum stendur fyri teirri arktisku deildini hjá WWF, á einari ráðstevnu í Tromsø í vikuni. Sambært Neil Hamilton er náttúran í tí arktiska økinum soleiðis skikkað, at hon tolir ikki eina oljudálking.

## VW á verkstað



*27.000 VW Jetta dieselbilar hava elektroniskt brek*
*(Mynd: DR)*

Týska bilverksmiðjan Volkswagen hevur boðað frá, at 27.000 fólkavognar skulu á verkstað, tí teir hava eitt elektroniskt brek, sum kann elva til ovurhita og eld. Talan er um dieselbilar av slagnum Jetta, sum eru gjørdir í tíðarskeiðinum frá 8. januar í fjør til 9. januar í ár. Í gjár visti danska VW-umboðið Skandinavisk Motor ikki, um nakar bilur við hesum brekinum er innfluttur til Danmarkar, men umboðið væntaði at fáa boð úr Týsklandi um tað.



*- Altjóða vælumtóktur tónleikur er ein munadyggur ísbrótari, sum er við til at geva eina dámliga ímynd av tí landi, haðani tónleikurin kemur, sigur SamVit*

# Tónleikur selur fisk…

**SamVit hevur sett sær fyri at vera við til at geva okkara evnaríku tónleikarum ein veruligan kjans at gera seg galdandi, eisini úti í heimi. Uppskriftin er at netverka við útlendskar lyklapersónar í vinnuni og gera íløgur í at marknaðarføra og kunna um hetta virðismikla tilfeingið, sum vit eiga í Føroyum**

MARKNAÐARFØRING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Áhugin fyri okkara tónleiki úti í heimi er longu vaktur. Nú er bara eftir at taða, so eisini tær størru fjøldirnar úti í heimi veruliga fáa eyga á okkara áhugaverdu tónleikanøvn.

Tað sigur SamVit, sum hevur sent fjølmiðlunum tilfar um, hvussu stovnurin ætlar sær at vera við til at »branda« føroyskan tónleik á altjóða pallinum.

- Tónleikur brandar lond og letur hurðar upp úti í heimi. Hvat hevði USA verið uttan rock & roll og Elvis, Ísland uttan Bjørk ella Svøríki uttan ABBA?

SamVit heldur, at um rætt verður atborið, kann tónleikur geva yvirskot á gjaldsjavnanum og eisini verða við til at rudda slóð fyri øðrum vinnum.

### Ein ísbrótari

- Altjóða vælumtóktur tónleikur er ein munadyggur ísbrótari, sum er við til at geva eina dámliga ímynd av tí landi, haðani tónleikurin kemur. Nógv dømi eru eisini um, at tónleikanøvn geva yvirskot á gjaldsjavnanum, um tey vinna fram á altjóða pallinum.

SamVit vísir á, at vit hava framúr evnaríkar tónleikarar í Føroyum, sum hava møguleika fyri veruliga at gera seg galdandi á altjóða palli.

- Føroyskur tónleikur hevur vind í seglunum í útheiminum í løtuni – og áhugin hjá altjóða tónleikamiðlum og í tónleikaídnaðinum fyri føroyskum tónleiki er stórur. Tí ræður nú um at smíða, meðan jarnið er heitt.

### Gevur úrslit

- Áhugin fyri føroyskum tónleiki úti í heimi er ikki bara komin av sær sjálvum. Hetta er úrslit av miðvísum arbeiði – at stimbra evnaríkar ungar tónleikarar, at geva teimum pallar at spæla á og í aðru atløgu at marknaðarføra og kunna um teir. Tónleikararnir sjálvir hava kvittað fyri og hava luttikið – og enntá vunnið - fleiri kappingar uttan fyri okkara landoddar.

SamVit hevur sett sær fyri at vera við til at geva hesum evnaríku tónleikarum ein veruligan kjans at gera seg galdandi.

- Vit halda, at uppskriftin er at netverka við útlendskar lyklapersónar í vinnuni og gera íløgur í at marknaðarøra og kunna um hetta virðismikla tilfeingið, vit eiga í Føroyum.

Stovnurin staðfestir, at áhugin fyri føroyskum tónleiki longu er vaktur.

- Nú er bara eftir at taða, so eisini tær størru fjøldirnar úti í heimi veruliga fáa eyga á okkara áhugaverdu tónleikanøvn, heldur SamVit.

### Marknaðarføring

Saman við øðrum samstarvspørtum, eitt nú Tutl og øðrum umboðum fyri tónleikarar og tónleikabólkar, Norðurlandahúsinum, Sendistovu Føroya og Mentamálaráðnum - arbeiðir SamVit nú miðvíst fyri at marknaðarføra føroyskan tónleik og føroyskar tónleikarar úti í heimi – og beint nú eru fleiri tiltøk fyri framman.

- Føroyar eru umboðaðar á MIDEM-tónleikaráðstevnuni í Fraklandi, sum er størsta sølustevnan fyri tónleikaídnað í heiminum. Henda stevna verður nú í vikuskiftinum í Fraklandi.

SamVit sigur, at ein nýggjur tónleikaportalur, sum skal kunna um og branda føroyskan tónleik, er vorðin veruleiki – og í mai verður eitt stórt føroyskt tónleika-og listatiltak í Brússel, sum belgiar sjálvir hava sett síni fingramerki á.

# Føroyar á a

**Fýra umboð fyri føroyskan tónleik fara avstað við fullari last í sambandi við stóru og navnframu tónleikaráðstevnuna Midem, sum er í Cannes í Fraklandi í døgunum 26.-31. januar**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Á altjóða ráðstevnuni í Fraklandi eru Føroyar á íslendska básinum, har fýra føroysk videoløg verða at síggja. Bólkarnir, ið hava sent video løg inn, eru Orca, Eivør, SIC og Yggdrasil. Annað tilfar um føroyskan tónleik verður eisini givið áhugaðum á ráðstevnuni.

SamVit sigur, at nógvar spennandi avbjóðingar eru fyri framman, tí eins og fiskur hevur tørv á virkjum, flutningi og søluliðum, hevur tónleikur tørv á einum sokallaðum MIC (Music Information Centre) ella einum Faroe Islands Music Export, ið virkar fyri, at tónleikavørurnar koma á altjóða marknaðin.

- Alt hetta fer sjálvsagt fram í tøttum samstarvi við tónleikarar og teirra umboðsfólk.

Á MIDEM-ráðstevnuni í Fraklandi luttaka Birita Nolsø, verkætlanarleiðari á SamViti, Sigvør Laksá, stjóri og umboð fyri Eivør, Kristian Blak, stjóri í Tutl og Linda Mortansdóttir fyri Norðurlandahúsið.

### Nýggjur portalur

Ein nýggjur føroyskur tónleikaportalur er nú stovnaður.

- Saman við Norðurlandahúsinum, Eivør Management og Tutl hava vit havt úr at gera við at leggja síðstu hond á henda portalin, sum skal virka sum ein sýnisgluggi á alnótini fyri føroyska tónleikapallin. Nýstovnaða heimasíðan hevur adressuna www.musicfromthefaroeislands.com

SamVit sigur, at portalurin í fyrstu syfti verður ein vangamynd av fløguaktuellum nøvnum, sum á ein ella annan hátt hava altjóða virði.